# Fiskimaður druknaði

Ein 49 ára gamal maður varð funnin deyður í havnini í Nuuk skírisdag. Grønlendska útvarpið sigur, at maðurin var við einum trolara, sum lá uttan fyri havnina. Maðurin fór í land mikudagin, men tá hann ikki var at síggja dagin eftir, fóru menn at leita eftir honum. Seinni skírisdag varð líkið av manninum funnið flótandi í havnini. Løgreglan sigur, at tað var rættiliga kalt og hált, og at maðurin helst er gliðin á sjógv og druknaður.

# Skjálvtar í Íslandi

Teir seinastu dagarnar hava fleiri veikir jarðskjálvtar verið undir havbotninum á Reykjanesrygginum í útsynning úr Íslandi. Fyrrakvøldið var ein lítil steðgur, men so bygjaðu skjálvtarnir aftur, og vórðu teir harðastu 4,0 á Richter-stiganum. Um mánaðarskiftið februar-mars vóru fleiri skjálvtar einar 45 fjórðingar úr landi, og tá var tann harðasti 4,8 á Richter-stiganum. Skjálvtarnir nú hava verið umleið 20 fjórðingar úr landi.

## Ein rótfestur partur

Í 1987 fór MBM (Meginfelag Búnaðarmanna) undir at flyta inn og selja kraftfóður, handilstøð og annað. Síðan tá hevur málið hjá deildini verið at keypa og selja fóður, tøð, grasfræ, nýtsluvørur og tílíkt til landbúnaðin, og við árunum hevur MBM-Fóður ment seg til at vera ein rótfestur partur av MBM.

MBM-Fóður hevði heimstað á bryggjuni í Kollafirði til januar 2003, tá ið eldsbruni beindi fyri bygninginum. Eftir av hava húsast í leiguhølum í Búnaðardeplinum í Kollafirði síðani eldsbrunan, var fóðursølan flutt, og er nú saman við øðrum virksemi hjá MBM at finna í nýggja høvuðsbygningin í Hoyvík.

Fóðursøla er hjá ymsum umboðum kring landið. At MBM kann lata limum sínum fóður og handilstøð, samstundis sum felagið keypir vøru teirra til virkingar og sølu, hevur givið bæði eigarum og fyritøku fyrimun. Við góðari ráðgeving og samskifti millum ráðgevara, viðskiftafólk og fyritøku hevur MBM-Fóður fingið støðugt meira at gera.

MBM-Fóður hevur í dag ein 19 tons stóran fóðurtangabil, sum koyrir A-blanding út til størsta partin av lutaeigarunum, ið nærum allir keypa frá sínum egna felag.

*(Kelda: mbm.fo)*




*» Eg ordni hesar tríggjar bøndurnar her á Velbastað fyrst, og fari síðani norður til Kollafjarðar at fylla bilin aftur*

*Bøndurnir ringja tá teir mangla fóður. Og so koyra vit tað út, sigur Mortan Poulsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

*» Tað er altíð áhugavert at síggja, hvar alt fóðrið, sum vit selja, fer*

**Ymiskur tørvur**

Tá Mortan møtti til arbeiðis týsmorgunin í farnu viku fór hann beinanvegin undir at fylla tangabilin við fóðri.

Hetta er ein stórur tangabilur, sum íalt rúmar eini 18 tonsum við fóðri. Hóast rúmdin og nøgdin kunnu tykjast øgiligar, so er rættiliga skjótt at sleppa av við alt fóðrið. Tað er nevniliga rættiliga ymiskt, hvussu nógv fóður ið bøndurnir hava tørv á.

– Summir skulu hava 10 tons og meiri enn tað, meðan aðrir hava kanska bert brúk fyri trimum tonsum, greiðir Mortan frá.

Eftir at hava fylt tangabilin um morgunin, legði hann beinanvegin leiðina til Velbastaðar, har fleiri bøndur bíðaðu eftir fóðri.

Tá vit hittu Mortan nakað undan middegi, hevði hann longu verið hjá tí eina bóndanum í bygdini, og skuldi síðani til tann næsta.

– Eg ordni hesar tríggjar bøndurnar her á Velbastað fyrst, og fari síðani norður til Kollafjarðar at fylla bilin aftur.

– Tá tað er gjørt, fari eg víðari til Leirvíkar og á Kambsdal, greiðir Mortan frá.

**Ikki føst ruta**

Hjá Mortani og hinum manninum, sum koyrir fóðurbilin, er ikki talan um nakra fastlagda rutu sum verður koyrd hvønn einasta dag kring landið.

– Nei, tað er ikki ein føst ruta. Bøndurnir, teir ringja tá teir mangla fóður. Og so koyra vit tað út.

– Vanliga rokna vit við eini leveringstíð upp á einar tríggjar dagar. Tí fáa vit planlagt alt so nøkulunda, sigur Mortan.

Fóðrið frá MBM er væl umtókt millum bøndur og kríatúr teirra, helst tí at tað er bæði gott og sera kraftamikið: Sum eitt beinleiðis úrslit av góða fóðrinum hevur onkur bóndi enntá fingið heiðursprógv fyri góða mjólk.

Tað kemur ikki av ongum!